# Skips Sosialurin
## - TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK






**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982**
**ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgava ( uttan útskrift )*
☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin


ítróttur

Nr. 16 • hósdagur • 24. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroya Bjór Simultan

**Annað vikuskiftið á árinum varð árliga simultan-kappingin í bridge spæld, og niðanfyri verða úrslitini prentað, eins og nøkur spøl verða viðgjørd**



BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

Undirtøkan var stór til Føroya Bjór Simultan kappingina leygardagin 12. januar. Spælt var í fimm støðum kring landið: í Klaksvík, Fuglafirði, Miðvági, Tórshavn og suðuri í Vági. Tilsamans 55 pør spældu við.

Tað gekk eitt sindur striltið at fáa úrslitini savnaði saman, men tá tað at enda eydnaðist, fingu vit hetta úrslitið (15 tey fremstu - tey ið ynskja at síggja øll úrslitini kunnu fara inn á heimasíðuna hjá Havnar Bridgefelag: www.bridge.fo
Her eru trý tey fremstu pørini í teimum lokalu kappingunum:

**Klaksvík**
***8 pør, miðal er 84***
1 Randi Jacobsen - Álvur Klakk 104, 2 Odd Fjallsbak - Hans E. Fjallsbak 90, 3 Jens Jacobsen - Jógvan Clementsen 87

**Vágar**
***8 pør, miðal er 84***
1 Thomas H. Gaardlykke - Jákup Egholm 94, 2 Árni Jacobsen - Joen H. Guttesen 93, 3 Ruborg Zachariassen - Gunnvør Hansen 91

**Fuglafjørður**
***11 pør, miðal er 165***
1 Atli Hansen - Jógvan Ranghamar 194, 2 Dia Petersen - Páll Hansen 192 3 Árant Berjastein - Magni Jøkladal 187

**Vágur**
***12 pør, miðal er 165***
1 Andrias Djurhuus - Eyðun Svalbard 200, 2 Marianna Eystberg - Elisa Holm 195, 3 Petur Winther - Jórun Winther 186

Tórshavn 1
***8 pør, miðal er 84***
1 Arnbjørn Sivertsen - Hans J. Petersen 104, 2 Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen 96, 3 Jens P. G. Nolsøe - Høgni Hansen94

**Tórshavn 2**
***8 pør, miðal er 84***
1 Carl Mikkelsen - Egil Helmsdal 105, 2 Jóannes Mouritsen - Heðin Mouritsen 94, 3 Súsanna Dam - Jórun Johannesen 88

## Mótspælið

Øllum dámar best at fáa góð kort í hondina. Tað er stuttligari at melda og vera spælførari. Men mótspælið hevur eisini stóran týdning. Her eru nøkur spøl frá Føroya Bjór Simultan kappingini í Havn, og felags er fyri øll, at mótspælið kundi verið betri.

Sunnan spældi hj 4 út, makkarin kongin, og spælførarin tók stikkið við essinum. Rútaraliturin á borðinum skuldi góðspælast, og Sunnan kom inn upp á rú K. Hjartari sá út at hava verið eitt plettskot av einum útspæli, so Sunnan helt fram við litinum. Eina løtu hugsaði hann, at tað kundi gera tað sama, hvønn hjartara hann spældi, so hann spældi frúnna, og drongurin hjá makkaranum fall undir. Borðið fekk óvæntað stikk fyri hj 10, men kontraktin mátti kortini ein niður. Mótspælið fekk fyri rú AK, kl A og hj Q9.

NS vóru ikki heilt nøgdir við mótspælið. Sunnan skuldi sjálvsagt heldur spælt ein lítlan hjartara í triðja stikki. Men lagið varð betri, tá ið teir sóu úrslitini á pappírinum - teir vóru einasta NS par, ið fingu eitt tal.

Eitt løgið spæl, og nógv kundi verið sagt um meldingarnar. EV hava 5sp í kortunum, og NS eitt gott offurmeld heilt uppi í 6kl. Men tað var mótspælið í 5klD, vit skuldu hyggja at.

Eystan legði fyri við at taka hj A, spældi síðan lítlan hjartara (Lavinthal) til trumf hjá Vestan. Mótspælið fekk fyri rú A afturat og kundi skriva sær 100 fyri ein dupladan niður. Hetta vísti seg at vera eitt miðal spæl.

Kundi mótspælið fingið eitt stikk afturat?

Ja - Eystan skal taka rú A, áðrenn hann spælir lítlan hjartara til trumf hjá makkaranum. So fær hann eisini fyri sín trumf, tá ið makkarin spælir rútara aftur!

“Honnør på honnør” - hava ikki allir bridgespælarar fingið hetta inn við móðurmjólkini?

Tað er mest sum automatiskt, at tú dekkar eitt honnørkort hjá mótpartinum, t.d. frúnna við konginum. Her er eitt spæl, har betri var at steðga á eina løtu heldur enn automatiskt at fylgja hesari annars so góðu reglu.

Útspælið gekk til tíggjuni og frúnna. Sunnan tók rú A og spældi rútara aftur til kongin á borðinum. Spælførarin hevði nú fimm stikk: Sp AK, hj AK og rú K. Skuldi kontraktin vinnast, mátti kleyvarin geva tvey stikk. Tað vanliga er, at tú fert inn á hondina og spælir kleyvara upp ímóti QJ98 á borðinum. Kanska tú klípir fyrstu ferð, kanska tú bíðar til aðru ferð. Her valdi spælførarin at spæla kl Q frá borðinum. Hygg at kortunum hjá Sunnan. Tað sær út sum, at spælførarin hevur kl A og roynir at klípa kongin, so Sunnan legði honnør á honnør at tryggja sær at fáa fyri tíggjuni. Eitt sindur bilsin slapp hann at eiga stikkið, spældi spaðara, sum spælførarin tók á hondini og spældi kleyvara ímóti borðinum. Norðan fekk fyri essið, og kleyvaraliturin gav spælføraranum tvey stikk og kontraktina.

Sunnan skal í hesum førinum ikki dekka frúnna við konginum beinanvegin, men skal bíða til kleyvarin verður spældur aðru ferð. Hann fær eitt stikk í litinum undir øllum umstøðum. Tá makkarin hevur essið, fær hann tvey stikk fyri K102.

## Føroya Bjór Simultan 2002
### Úrslitið fyri alt landið

| nr | navn | spælistaður | stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Randi Jacobsen - Álvur Klakk | Klaksvík | 914 |
| 2 | Atli Hansen - Jógvan Ranghamar | Eysturoy | 902 |
| 3 | Árant Berjastein - Magni Jøkladal | Eysturoy | 885 |
| 4 | Arnbjørn Sivertsen - Hans J. Petersen | Tórshavn | 877 |
| 5 | Edmund Joensen - Hans E. Joensen | Eysturoy | 857 |
| 6 | Thomas H. Gaardlykke - Jákup Egholm | Vágar | 850 |
| 7 | Marianna Eystberg - Elisa Holm | Suðuroy | 844 |
| 8 | Carl Mikkelsen - Egil Helmsdal | Tórshavn | 843 |
| 9 | Andrias Djurhuus - Eyðun Svalbard | Suðuroy | 816 |
| 10 | Petur Winther - Jórun Winther | Suðuroy | 811 |
| 11 | Jens Jacobsen - Jógvan Clementsen | Klaksvík | 784 |
| 12 | Jóannes Mouritsen - Heðin Mouritsen | Tórshavn | 782 |
| 13 | Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen | Tórshavn | 776 |
| 14 | Árni Jacobsen - Joen H. Guttesen | Vágar | 775 |
| 15 | Henriette Svenstrup - Ingibjørg Hansen | Tórshavn | 773 |

## Her eru trý spøl frá Føroya Bjór Simultan kappingini.

Spæl 15
S/NS

Norðan
Sp 108543
Hj KJ
Rú 53
Kl 10954

Vestan
Sp J2
Hj 1073
Rú QJ10876
Kl KJ

Eystan
Sp AKQ
Hj A852
Rú 942
Kl Q82

Sunnan
Sp 976
Hj Q964
Rú AK
Kl A763

NS: Hans J. Petersen - Arnbjørn Sivertsen
EV: Henriette Svenstrup - Ingibjørg Hansen

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| - | - | - | 1 kl |
| 1 ru | pass | 3 ut | pass |
| pass | pass | | |

Útspæl: hj 4

Spæl 6
E/EV

Norðan
Sp A
Hj 105
Rú KJ9642
Kl AKQ8

Vestan
Sp J9632
Hj 7
Rú 1087
Kl J1064

Eystan
Sp KQ1087
Hj AJ9632
Rú A
Kl 7

Sunnan
Sp 54
Hj KQ84
Rú Q53
Kl 9532

NS: Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen
EV: Hans J. Petersen - Arnbjørn Sivertsen

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| - | - | 1 hj | pass |
| pass | 2 rú | 2 sp | pass |
| pass | 3 kl | pass | pass |
| 3 sp | D | pass | 4 kl |
| pass | pass | 4 sp | 5 kl |
| D | pass | pass | pass |

Útspæl: hj A

Spæl 20
V/A

Norðan
Sp QJ43
Hj Q95
Rú J854
Kl A4

Vestan
Sp K8
Hj A864
Rú 763
Kl 7653

Eystan
Sp A952
Hj K7
Rú K102
Kl QJ98

Sunnan
Sp 1076
Hj J1032
Rú AQ9
Kl K102

NS: Mortan Rasmussen - A.G. Nielsen
EV: Hans J. Petersen - Arnbjørn Sivertsen

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| pass | pass | 1 kl | pass |
| 1 hj | pass | 1 sp | pass |
| 1 ut | pass | pass | pass |

Útspæl: rú 4